# Marknaðarføroyingar



*Oddfríður Marni Rasmussen skrivar*

Tað er ein sera ótrygg tilvera at vera yrkislistafólk í Føroyum. Ongar greiðar skattareglar eru fyri hendan samfelagsbólkin, onki greitt inntøkugrundarlag tí, at vit noyðast at tillaga okkum ein marknaðarbúskap, ein marknaðarbúskap, sum er til orsakað av einari ávísari sølunøgd. Tí eru nógv av yrkislistafólkunum í stórum vanda fyri at standa í stórari skuld, tá ið arbeiðið er liðugt og úrslitið kemur á marknaðin.

Í staðin fyri at hirða yrkislistafólkini í Føroyum út á ein marknað, sum ikki beinleiðis er egnaður hesum bólki, áttu tey at verðið stuðlað í sínum arbeiði. Hetta kann gerast við, at greiðar skattareglar verða gjørdar. Ein listamálari, sum í eitt ár arbeiðir fram ímóti eini framsýning, og sum síðani fer uttanlands at selja sínar málningar, skal gjalda 50% til gallaríið, 25% í skatt av sínum 50%'um og eini 10% í tilfari. Eftir hevur hann eini 15%. Um hesin listamálari er v-talsskrásettur, kann hann avskriva tilfar o.a. í skatti. Men ein listamálari arbeiðir við einari framsýning í eitt ár, og um hann hetta árið, meðan hann arbeiðir fram ímóti einum úrsliti, ikki vinnur sær pengar, minst 20.000 kr., so verður hann strikaður sum v-talsskrásettur. Listamálarin setur so nógv í gongd, men hann er tann, sum hevur minst pengar eftir tá ið avtornar.

Eitt annað dømi er ein, sum gevur út eina nótabók við føroyskum løgum. Bert eini 7% av føroyingum duga at lesa nótar. Hvussu kann hesin vinna 20.000 kr. árliga við at selja bókina?

Ofta eru listafólk í teirri støðu, at tey ikki hava nakra inntøku, og hetta er serliga í tíðini tá ið tey skapa listaverkið. Aðrastaðni (hetta irriterandi orðið) hava tey eitt, sum kallast inntøkuloysi í staðin fyri arbeiðsloysi. Ein listamaður verður ongantíð arbeiðsleysur, men hann er inntøkuleysur í skapanarprosessini.

Ein listamálari skal ikki bara gjalda húsaleigu og alt annað, sum fólk vanliga gjalda fyri. Hann skal eisini leiga sær eitt atelier fyri einar 3000 til 4000 kr. um mánaðin aftrat øllum hesum. Og inntøkan er ikki stór frammanundan.

Um tað skal verða livandi hjá yrkilslistafólkum í Føroyum, mugu komandi politiakarar landsins taka listaálitið í álvara, og gera sum tað verður mælt til í álitinum: Mong yrkislistafólk hava skattligar trupulleikar, og eigur tí at verða settur ein arbeiðsbólkur við umboðum fyri skattavaldið, Mentamálastýrið og LISA við tí eindamáli at greina hesar trupulleikar og koma við uppskoti til møguligar lógarbroytingar.

Eg vil mæla politikarunum til, at hyggja at tí danska álitinum "Kunstnernes beskatning" frá 2001. Har standa reglarnir so greiðir sum gjørligt, og hetta álitið kann vera við til, at byggja upp eina føroyska skatta- og inntøkulóg fyri listafólk, sum hóskar til tann skroypiliga marknaðin vit liva í, í staðin fyri at noyða okkum at gerast marknaðarføroyingar.

Eg síggi, at nakrir flokkar og nakrir uppstillaðir einstaklingar eru farnir at taka list positivt upp á tungu. Hetta er bara at fegnast um, og vil eg við hesum mæla øllum listafólkum í Føroyum til, at seta krossin við tey, sum vilja stuðla og harvið menna føroyskt listalív.

Fyri at koma við einum góðum dømi, so eru tríggjar innstillingar til norðurlendskar virðislønir í ár. Tann fyrsta var Tóroddur Poulsen og yrkingasavnið "Blóðroyndir." Tann næsta var Jóanes Nielsen og "Eitur nakað land week-end," sum fekk norðurlendsku dramatikaravirðislønina, og tann triðja er Sunleif Rasmussen og fyrsta føroyska symfoniin, "Oceanic Days." Vinnarin av hesi virðisløn verður kunngjørdur í mai. Vit er nógv, sum fegnast um hetta, men tað tey flestu ikki vita er, at allir hesir listamenninir, sum eru innstillaðir, skrivaðu verk síni, meðan teir fingu trý ára legat frá Statens Kunstfond. Við øðrum orðum: Danir hava goldið løn og harvið friðin at arbeiða, meðan føroyingar reypa sær av sínum landsmonnum. Hesir eru stórir umboðsmenn fyri Føroya land. Tit sum stilla upp, hugsið um hetta!!!

Forrige | Næste | Svar | Svar alle | Videresend | Flag | Udskriv | Rediger | Slet | Ombryd igen | Udkast

**TELDUBRÆVIÐ**

Frá: Chanette á Lofti, Svøríki, chanettelofti@hotmail.com
Til: turid@sosialurin.fo
Evni: Vikuskifti

## Babba er heimagangandi

Babba vaskar upp, babba vaskar klædir, babba vaskar gólv, babba ger mat, babba seymar gardinir.... Hesum kunnu svensk børn breggja sær meira av enn onnur børn í heiminum, tí sambært altjóða kanningum eru teir svensku páparnir verðinsmeistarar í at taka eina hond í har heima.

Herfyri var ein sending í svenska sjónvarpinum, sum segði, at vesturheimurin gongur ímóti einum barnsburðarligum falitti. Tað merkir, at hvør kvinna í vesturheiminum føðir ov fá børn. Í framtíðini førir tað so við sær, at tað verða færri og færri ung fólk til at arbeiða og halda okkara samfelagsstøði á sama stigi sum nú, samstundis, sum tað verða fleiri gomul, sum skulu hava pensiónir. Í Danmark tosar man longu um, at samfelagið neyvan um 15-20 ár fer at hava ráð til at gjalda pensiónir til øll gomul. Tískil hevur Svøríki valt at føra ein sera progressivan familjupolitik. Man roynir at gera tað lættari hjá ungum fólki at fáa sær eina útbúgving og karrieru samstundis, sum tey hava smá børn.

Jøvn arbeiðsbyrða í heiminum millum mann og konu, er eisini ein spurningur á hesum økinum. Tí ein av høvuðsorsøkunum til, at kvinnur føða ov fá børn er, at samstundis, sum samfelagið hevur brúk fyri, at konufólkini eru úti á arbeiðsmarknaðinum, so vísa kanningar í Danmark, at ein mamma, sum fer út at arbeiða fulla tíð, framvegis tekur sær av meginpartinum av húsarhaldinum. Tískil eru tað fleiri og fleiri ungar kvinnur, sum velja ikki at fáa børn í dag.

Ein av orsøkunum til, at svenskir pápar eru verðinsmeistarir í aktivt at taka lut í røkt av børnum og heimi, er ein avbera fleksibul og góð barsilsskipan, sum eisini umfatar pápar. Skipanin, sum eitur foreldrapening, gongur í stuttum út uppá, at tá eitt barn verður føtt, so fáa mamman og pápin rætt til seks mánaðar farloyvi hvør við 85% av teirra vanligu løn. Og hetta rindar staturin. Tað eru so eitt hav av møguleikum, har foreldrini kunnu velja at nýta hendan pening, alt eftir økonomisku støðuni hjá familjuni. Um tú fært foreldrapening sjey dagar um vikuna, so røkkur tað til eitt ár, men tú kanst eisini fáa foreldrapening fyri bert fimm, fýra ella tríggjar dagar, og so verður barsilstíðin longri. Maðurin kann eisini velja at geva konu síni fimm av teimum seks mánaðunum, um hann er tann, sum tjenar mest, men hann skal sjálvur taka minst ein mánaða (30 dagar) farloyvi. Hesar 30 dagarnar kann hann so aftur deila upp, sum honum lystir. Hann kann arbeiða sjey tímar um dagin í staðin fyri átta, ella hann kann arbeiða fýra dagar um vikuna ístaðin fyri fimm og so framvegis.

Í hesum døgum fáa 385.000 svenskir pápar eitt bræv inn um hurðina, sum sigur teimum, hvussu nógvan foreldrapening, teir hava til góðar at halda farloyvi fyri saman við børnum sínum. Hetta verður gjørt fyri at elva fleiri pápum til at taka farloyvi saman við børnunum, tí at hóast sviar eru verðinsmeistarar, so kundi tað framvegis verið fleiri afturat, sum gera nýtslu av hesu frálíku skipan.

Nú er tað, sum um eg hoyri onkur ekko ímillum fjøllini har uppi, sum siga, at svenskir pápar bara eru undir tufluni. Men til tað er bara at siga, at onkusvegna hevur tann aktiva rollan, sum tann svenski pápin spælir í heiminum og barnauppalingini borið frukt. Tað merkist nevniliga týðiliga, hvussu opið og frítt forholdið er millum pápar og børn, soleiðis at pápin fyri tað mesta er akkurát líka so góður, sæð við barnsins eygum, til at loysa onkran trupulleika, sum mamman er tað.

So eftir summarferiuna eri tað helst eg, sum komi troytt heim eftir langan dag á arbeiðinum, fari inn í køkin og gevi manni mínum ein klams í rumpuna og ein koss á kjálkan, áðrenn eg seti meg í stovuna við beinunum uppi á borðinum við avísini og rópi: "Hvat skulu vit hava til døgurða í dag, elskaði..............?"

Fleiri upplýsingar um svensku skipanina fáast á: www.forsakringskassan.se



# Mánadagur 29. apríl

### SVF

18.25 DV í kvøld
18.30 Fres - fimleikur í Eysturskúlnaum e
19.00 Miðlingurin Malcolm 10
19.25 Orkidéir í Skandinavia - svensk sending
20.00 Dagur og Vika
20.20 Brennidepilin - norsk sending
20.50 Læknin hevur orðið
21.20 Bláa gongustjørnan 1:8 - náttúrurøð frá BBC
22.10 New York Blues
22.55 Krígsfelagar 1:10 - nýggj amerikonsk røð - Óhóskandi fyri børn
0.05 Liðugt

### Eurosport

7.30 Nascar - Winston Cup Series Talladega United States
8.30 Cycling - World Cup Amstel Gold Race Netherlands
9.00 Equestrianism - Show Jumping
10.00 Artistic Gymnastics - European Championship
11.00 Weightlifting - European Championship
13.00 Football - Kick In Action Groups
13.30 Football - World Cup Road to
15.00 Football - World Cup Legends
16.00 Football - European Under-17 Championship - Live
17.45 Football - Eurogoals
19.30 News - Eurosportnews Flash
19.45 Football - The Match of the Century
20.30 Football - Gillette Dream Team
21.00 All Sports - Watts
21.30 Football - Eurogoals
23.15 News - Eurosportnews Report
23.30 Football - The Match of the Century
0.15 News - Eurosportnews Report

### BBC Prime

0.00 TLZ: »Nomads of the Wind – Distant Horizons«
1.00 TLZ: »The Human Body – An Everyday Miracle«
2.00 TLZ: »The Art of Breathing«
2.30 TLZ: »Food: Whose Choice Is It«
3.00 TLZ: »A Hard Act to Follow«
3.25 TLZ: »Pause«
3.30 TLZ: »A New Sun is born - The Coup«
3.55 TLZ: »Pause«
4.00 TLZ: »Back to the Floor… again – Working Holiday«
4.40 TLZ: »Megamaths – Tables – Nine Times Table«
5.00 TLZ: »Greek Language and People – Meeting People«
5.30 Follow Through
6.00 The Story Makers
6.15 Step Inside
6.25 The Further Adventures of Superted: »Bubbles, Bubbles Everywhere«
6.45 Playdays
7.05 Blue Peter
7.30 Ready Steady Cook
8.15 House Invaders
8.45 Bargain Hunt
9.15 The Making of The Trials of Life
10.15 The Weakest Link
11.00 Teen English Zone
11.30 Great Writers of the 20th Century: »Raymond Chandler«
12.30 Bergerac: »My Friend Charlie
13.30 Ready Steady Cook
14.15 The Story Makers
14.30 Step Inside
14.40 The Further Adventures of Superted: »Bubbles, Bubbles Everywhere«
15.00 Playdays
15.20 Blue Peter
15.45 Mrs Bradley Mysteries
16.45 Anything to Declare?
17.15 Animal Hospital
17.45 The Weakest Link
18.30 What Not to Wear
19.00 Eastenders
19.30 The Brittas Empire: »A Walk on the Wild Side«
20.00 In a Land of Plenty
21.00 Coupling: »Size Matters«
21.30 Parkinson
22.30 Animal Police
23.00 The Cops

### BBC World

0.00 BBC News – followed by Weather
0.30 Correspondent (r)
1.00 BBC News – followed by Weather
1.30 The Car's The Star (r)
2.00 BBC News – followed by Weather
2.30 Dateline London (r)
3.00 BBC News – followed by Weather
3.30 Asia Today (r)
3.45 Reporters (r)
4.00 BBC News – followed by Weather
4.30 HARDtalk
5.00 BBC News – followed by Weather
5.30 World Business Report
6.00 BBC News – followed by Weather
6.30 World Business Report
7.00 BBC News – followed by Weather
7.30 World Business Report
7.45 Sport Today
8.00 BBC News – followed by Weather
8.30 Euro Brief
9.00 BBC News – followed by Weather
9.30 HARDtalk (r)
10.00 BBC News – followed by Weather
10.30 Correspondent (r)
11.00 BBC News – followed by Weather
11.30 Asia Today
11.45 World Business Report
12.00 BBC News – followed by Weather
12.30 HARDtalk (r)
13.00 BBC News – followed by Weather
13.30 World Business Report
13.45 Sport Today
14.00 BBC News – followed by Weather
14.30 Clarkson's Car Years: »Who killed the British Car Industry?« 4:6 (r)
15.00 BBC News – followed by Weather
15.30 Asia Today
16.00 BBC News
16.30 HARDtalk (r)
17.00 BBC News – followed by Weather
17.15 World Business Report
17.30 Click Online (r)
18.00 BBC News – followed by Weather
18.30 World Business Report
18.45 Sport Today
19.00 BBC News – followed by Weather
19.30 HARDtalk (r)
20.00 BBC News – followed by Weather
20.30 Holiday
21.00 BBC News – followed by Weather
21.30 World Business Report
22.00 BBC News – followed by Weather
22.30 Earth Report: »The Long Road to Recovery«
23.00 BBC News – followed by Weather
23.30 World Business Report (r)
23.45 Asia Today

### TV3

5.00 Garfield og venner
5.25 Børnehjørnet
7.00 TV-Shop
8.00 Hvide Løgne
8.25 Ricki Lake
9.15 Ricki Lake
10.10 Horton-sagaen
11.00 Horton-sagaen
11.50 Melrose Place
12.45 Time of Your Life
13.45 Popular
14.35 Med på moden
15.05 Pæn pige – sej sild
15.35 Ricki Lake
16.30 Simpsons
17.00 Alle elsker Raymond
17.30 Vild med dig
18.00 Sjov og Spas
18.30 The Ellen Show
19.00 Fear Factor
20.00 Mandagsbio: Cliffhanger - på afgrundens rand
22.05 Bag Facaden
23.10 Seinfeld
23.40 Simpsons
0.10 Ti tommelfingre
0.40 Walker Texas Ranger
1.35 Ricki Lake
2.30 Træneren
3.00 Træneren
3.30 Ti tommelfingre
3.55 Sunset Beach
4.40 Godnat

### ÚF

7.00 Tíðindi
7.05 Morgunlestur - Martin Restorff Jacobsen, prestur, lesur
7.15 Barnaløtan - Jonna og Kári leggja til rættis
7.30 Tíðindi
7.35 Morgunrásin - Bjarni Mohr og Dia Midjord leggja til rættis
8.00 Tíðindi
8.03 Morgunrásin
8.50 Valagn - Reportasja frá valstríðum upp undir løgtingsvalið. Kári Durhuus og Gunnar Skúvadal leggja til rættis
9.00 Tíðindi
9.03 Sunnudagsløtan (e) - Jonna og Kári leggja til rættis
9.35 Dagsins tónar
9.50 Morgunlestur (e) - Martin Restorff Jacobsen, prestur, lesur
10.00 Tíðindi
10.03 Fimleikaløtan 3
10.10 Tit skriva, vit spæla - Øssur Egholm leggur til rættis
11.00 Tíðindi
11.03 Undir døgurða
12.00 Veðurtíðindi
12.02 Middagstónleikur
12.15 Skráin og lýsingar
12.20 Tíðindini
12.40 Døgurðatónar
13.00 Tónatímin
14.00 Tónleikur
15.00 Tíðindi
15.03 Nýtt og gott gamalt - Magnus Johannesen velur løgini
16.00 Tíðindi
16.03 15 tær bestu (e) - Heðin Arge stílar fyri
17.00 Tíðindi
17.05 Valagn (e) - Reportasja frá valstríðum upp undir løgtingsvalið. Kári Durhuus og Gunnar Skúvadal leggja til rættis
17.15 Hvat nú? - Elis Poulsen skipar fyri
18.00 Barnaløtan (e) - Jonna og Kári leggja til rættis
18.25 Skráin og lýsingar
18.30 Tíðindini
19.00 Stýrivolt - Mentanarlig brúkarasending. Birgir Kruse leggur til rættis
19.30 Rák - Tónleikasending hjá Kim Hansen
20.00 Løg mær dámar - 4. og seinasta sending hjá Magnus Wilhelm Dam Jacobsen
20.30 Gestir hjá feigum - Stuttsøga eftir Hanus Kamban. Egi Dam lesur
21.00 Tíðindi
21.05 Dagsetur - Øssur Egholm leggur til rættis
22.00 Estudio 2000 - Tónleikasending hjá Kára Annand Berg
23.00 Tíðindi





*Bjørn Nørgaard og konan Lena Adler Petersen slakta eitt ross uttanfyri Lousiana í 1970*

## Stýrivolt

### Bjørn Nørgaard

Í seinnu samrøðuni við danska listamannin Bjørn Nørgaard (f. 1947) verður nomið við fyrstu listarligu avrikini í 1964 og sonevndar happenings, listarlig tiltøk við samfelagsligum bráddi í 1969 og 1970. Bjørn Nørgaard, sum í listini javnan vendur aftur til bíbilsk og átrúnaðarlig evni, greiðir frá um andan í 60'unum, tá Bob Dylan og Vietnamkríggið vóru tveir týðandi tættir, ið løgdu karmin um kjakið og listina. Ein av arbeiðsháttum Nørgaards frá hesari tíðini, er at nýta alment kend myndaevni, tøma tey fyri týdning og geva teimum nýtt innihald. Birgir Kruse leggur sendingina Stýrivolt til rættis.

## Bláa gongustjørnan 1:8

SVF Mánakvøldið kl. 21.20

– Náttúrurøð frá BBC

Ein bláhvalur er 30 metrar langur, hevur tungu, sum vigar sum ein fílur og sveiv so breiða, sum eitt fótbóltsmál. Hann er ikki bara heimsins størsta dýr, men tað størsta dýrið, sum hevur livað á jørðini. Men enn vita vit ikki, hvar hann leggur hvølparnar. Bláhvalurin er ein sjálvsøgd ímynd av tí stóra bláa havinum, sum tekur so nógv pláss á gongustjørnu okkara, men sum framvegis, fyri ein stóran part, er ókent og duldarfult.

## Cliffhanger – på afgrundens rand





Sylvester Stallone spælir leiklutin sum tann fyrrverandi mountain-rangarin, Gabe Walker, sum knappliga verður kastaður út í eitt av teimum mest krevjandi ævintýrunum nakrantíð. Ein bólkur av ránsmonnum hevur mist nakrar milliónir í fjøllunum, og teir noyða Gabe at hjálpa til at finna pengarnar.

### Rás 2

9.45 Orðið - Bíbliulestur v/ Anju Hansen
10.00 Jógvan á Lakjuni (e) - endursending frá leygardegnum - Prát og tónleikur - Sonne Smith hevur Jógvan á Lakjuni í útvarpsstovuni
11.00 Fólk á rásini (e) - Endursending frá leygardegnum - Vagnur Michelsen prátar við Atla Klein Olsen úr Vestmanna (seinni partur)
12.00 Tíðindi og kunngerðir
12.15 Tónleikur
13.00 Leysaløtan - Vit spæla tónleik og tosa um politik »non stop« til kl 18.00 - Vit fáa vitjan av umboðum fyri m.a - Tjóðveldisflokkin, Fólkaflokkin og Sambandsflokkin - Eisini er møguleiki fyri at ringja inn við spurningum og viðmerkingum
18.00 Tíðindi og kunngerðir
18.15 Tónleikur
19.00 Orð á Leiðini (EvR) (e) - Endursending frá hósdegnum - Jeremias profetur: (3.12) - Zacharias Zachariassen leggur til rættis
19.40 Tónleikur
21.00 Tíðindi og kunngerðir
21.15 Orðið (e) - Endursending frá í morgun - Bíbliulestur v/ Anju Hansen
21.30 Halleluja - Andalig tónleikasending v/ Heina Lützen og Jógvan Poulsen
22.30 Tónleikur
0.00 Endursending frá kl. 12.00 í dag non stop til kl. 06.00

### Lindin

13.00 Byrjan - Dagsskráin verður lisin
13.05 Bankabók Trúarinnar - eftir C. H. Spurgeon
14.30 »Jesus og eg« barnasending v/ Stellu Zachariassen (e)
15.00 Bønarlinjan frá hósdegnum verður endursend
17.00 Bønartænastan byrjar. Tlf. 321377, tilber at senda fax nr. 321379
17.55 Dagsins orð eftir Svenning av Lofti
18.00 Bønartænastan - Biðji verður fyri bønarevnunum
19.00 Brot & Bitar, ørvísi tíðindasending
20.55 Bankabók Trúarinnar - eftir C. H. Spurgeon
21.00 »Vón fyri tær« v/ Sólbjørg Zachariassen
22.55 Dagsins orð eftir Svenning av Lofti
23.00 Dagsskráin fyri týsdag verður lisin
23.10 Blandaður tónleikur, Dagsins Orð, o.a.
2.00 Møti (e)
3.00 Blandaður tónleikur, Dagsins Orð, o.a.
6.00 Vit gevast